**UTTAN ÚR HEIMI**

## Fundast um rækjuprísir

Tað er ikki bara tann føroyska rækjuvinnan, sum er í trupulleikum. Soleiðis er eisini í Grønlandi.

Grønlendska veiðimannafelagið KNAPK og Royal Greenland høvdu fyrradagin fund um viðurskiftini, eftir at rækjuprísurin er fallin. Har samdust partarnir um at halda fund hvørja viku fyri at fylgja gongdini í vinnuni.

Tønnes Berthelsen hjá KNAPK sigur, at partarnir fara at halda eyga við rækjuprísinum á útlendsku marknaðunum, men hann ásannar, at á altjóða marknaðinum er prísurin í botni í løtuni.

## Keypa ikki bilar

Hóast rentan er so lág sum sjáldan fyrr, og hóast danir hava fingið sera góðar møguleikar at umleggja síni lán, er tað einki, sum bendir á, at fólk hava hug at nýta fyrimunirnar til at keypa sær nýggjan bil.

Bent Mikkelsen í bilainnflytarafelagnum sigur við Jyllandspostin, at tølini í juni vóru líka vánalig sum mánaðarnar frammanundan, og hann sigur seg ikki duga at síggja nakran glotta fyri framman. Tvørturímóti er hann bangin fyri, at nýggir bilar eru vorðnir so dýrir, at vanligar inntøkur eru ikki nóg mikið til bilkeyp longur.

Lítla bilasølan fer eisini at svíða í statskassanum. Stjórnin hevur roknað við, at bilasølan fer at veksa seks prosent í ár, og at statskassin sostatt fær væl meiri inntøkur frá skrásetingargjaldinum. Men so verður ikki. Bent Mikkelsen sigur, at heldur verandi gongd fram, fer statskassin at missa millum 2,5 og tríggjar milliardir krónur í skásetingargjøldum.

## Stórur áhugi fyri flogfelagi

Fleiri av teimum størstu flogfeløgunum liggja nú framvið at sleppa at keypa sveisiska flogfelagið Swis International Airlines.

Talsmaðurin hjá felagnum vil ikki upplýsa, hvørji tey áhugaðu feløgini eru, men týska Lufthansa, bretska British Airways og franska Air France hava fyrr sagt seg hava áhuga í sveisiska felagnum. Swiss International Airlines fór fyrstu ferð á flog fyri einum góðum ári síðani og kom ístaðin fyri tað gamla Swissair, sum fór á húsagang í 2001. Sveisiski ríkiskassin eigur 19 prosent av felagnum.

Men felagið hevur havt tað tungt, og stjórnin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at seta meiri pengar í felagið. Fyri einum mánað síðani setti felagið fleiri flogfør, og 3.000 fólk vórðu søgd úr starvi. Men tað var ivaleyst eisini neyðugt, tí fýra teir fyrstu mánaðarnar í ár hevði felagið umleið hálva aðru milliard krónur í halli.

## Keypti bil við kokaini

Ein maður í Týsklandi gjørdist ikki sørt skakkur, tá hann nú um dagarnar keypti ein bil á uppboðssølu hjá tollvaldinum.

Tá maðurin fór at kanna bilin nærri, kom hann fram á tíggju kilo av kokaini í viðførisrúminum, skrivar blaðið Hamburger Morgenpost. Tann 41 ára gamli maðurin boðaði alt fyri eitt tollvaldinum frá.

Hamburger Morgenpost skrivar, at tollvaldið tók bilin í 1997 og fann tá 54 kilo av kokaini í bensintanganum og rúminum, sum er ætlað eykahjólinum. Men eftir øllum at døma sá løgreglan ikki tey tíggju kiloini í viðførisrúminum, men tey hevur tollvaldið so fingið nú.

# Ellivu fólk skotin í USA



*Ein av teimum særdu fær hjálp í einum sjúkrabili uttan fyri Lockheed-verksmiðjuna í Meridan*

**Douglas Williams skeyt fimm av sínum starvsfeløgum og síðani seg sjálvan. Eina aðrastaðni vórðu fimm fólk funnin skotin.**

USA
*Árni Joensen*

Í hermannabúna og vápnaður við einari høglbyrsu og einari riflu fór Douglas Williams til arbeiðis á Lockheed-verksmiðjuni í býnum Meridan í Mississippi fyrradagin. Har skeyt hann fimm av sínum starvsfeløgum og særdi fleiri onnur, áðrenn hann skeyt seg sjálvan.

Fýra av teimum, sum Douglas Williams skeyt, vóru svørt, og tað hevur fingið løgregluna at halda, at talan var um rasistisk morð. Men illgerðin kom ikki óvart á hini, sum arbeiddu saman við drápsmanninum, tí hann hevði fleiri ferðir tosað um, at hann ætlaði sær at drepa onkran. Hetta hevði leiðslan á verksmiðjuni fingið at vita, men hon hevði kortini einki gjørt við tað.

Tilburðurin í Meridan hendi bert tveir dagar eftir, at løgreglan í Kalifornia kom fram á fimm lík í einum húsum í býnum Bakersfield. Í húsunum funnu løgreglumenninir líkini av trimum børnum, mammu teirra og ommuni.

Teir báðir tilburðirnir hava enn einaferð fingið amerikanskar politikarar at tosa um at broyta ta lagaligu vápnalógina.

# 54 lond fátækari í dag enn í 1990

**Menningin í heiminum gongur alt ov seint, og ringast stendur til í londunum sunnan fyri Sahara og í Mið- og Eysturevropa.**

FÁTÆKRADØMI
*Árni Joensen*

Í september í 2000 samdust heimsins leiðarar um at fara undir eitt veruligt átak, sum skuldi gera livikorini javnari kring heimin, men sambært einari nýggjari uppgerð er langt eftir á mál, og nógvastaðni hevur gongdin verið tann øvugta av tí, sum ætlað varð.

Eitt av málunum, sum leiðararnir settu sær, var, at í 2015 skal talið á teimum, sum hava minni enn ein dollara at liva fyri um dagin, vera helmingin av tí, sum tað var í 1990. Nýggja uppgerðin vísir, at tað ber til at røkka hesum málinum, men at tað kemst fyrst og fremst av búskaparframgond í heimsins fólkaríkastu londum, Kina og India.

Í nítiárunum eydnaðist tað kinesisku myndugleikunum at lyfta 150 milliónir fólk burtur úr fátækradømi, men samstundis eru livilíkindini í Kina vorðin sera ymisk. Uppgerðin sigur, at í Shanghai eru livilíkindini á sama stigi sum í Portugal, men úti á bygd líkjast tey mest viðurskiftunum í teimum fátækastu londunum í Afrika.

Júst har, í londunum sunnan fyri Sahara, er bardagin ímóti fátækradøminum steðgaður upp, og tey, sum hava gjørt uppgerðina, siga, at við verandi gongd verður málið, sum skuldi røkkast í 2015, ikki rokkið fyrr enn í 2147.

Omar Norman, sum er varastjóri á menningardeildini hjá ST, og sum hevur verið við tilat gera uppgerðina, stúrir eisini fyri gongdini í Mið- og Eysturevropa. Hann sigur, at lond sum Ukraina, Moldova og Tadjikistan hava havt búskaparliga afturgongd seinastu árini og eru í dag í tí fátækasta bólkinum.



**Alistøðin á Bakka og Bakkafrost halda ikki, at tey hava brotið lógina, men nú liggur málið í hondunum á løgregluni, siga stjórarnir báðir, Hans og Regin Jacobsen**

ÚTFLUTNINGUR UNDIR ILLGRUNA
*Áki Bertholdsen*



*Bakkafrost og alistøðin á Bakka er meldað til løgregluna. Nu ivi er sáddur um framferðina, hava tikið tað til eftirtektar og hava steðga virkseminum, sum illgruni er um, siga Hans og Regin Jacobsen á Bakkafrost*

# Hava útflutt 90 tons av laksi undir ILA- illgruna

– Vit halda ikki, at vit hava brotið lógina.

Hans Jacobsen, stjóri á alistøðini á Bakka og Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, eru ikki samdir við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna í, at teir hava brotið lógina.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur meldað alistøðina á Bakka og Bakkafrost fyri at hava brotið kunngerðina um niðurberjing av ILA og fyri at hava brotið matvørulógina.

Í tíðindaskrivi týskvøldið siga teir báðir stjórarnir siga, at teir hava hildið seg til forskriftirnar.

Men nú ivi er sáddur um framferðina, hava teir tikið tað til eftirtektar og hava steðga virkseminum.

### Ongar viðmerkingar

Teir báðir stjórarnir siga, at teirra virki er eitt av teimum, sum hevur verið fyri tí vanlagnu, at verða rakt av ILA við teimum avleiðingum, tað hevur við sær.

– Vit hava síðani ILA varð staðfest á Skálafjørðinum í mars mánað havt tætt samskifti við Fiska & Djórasjúkudeildina á Heilsufrøðisligu Starvsstovuni um, hvussu farast skuldi fram.

– Vit hava fylgt teim mannagongdum, kunngerðum og lógum, sum fyriskriva, hvussu farast skal fram í slíkum førum og 14. hvønn dag hava teir havt eftirlit við virksemi okkara.

Hans og Regin Jacobsen sigur, at tað hava ikki verið stórvegis viðmerkingar, fyrrenn nú.

### Hava skyldur

Teir siga, at umframt at hava skyldu til at halda seg til reglurnar, hevur einhvør fyritøka eisini skyldu til at aansa eftir teimum virðum, sum eru í fyritøkuni.

Hetta er ein skylda sum fyritøkan hevur, bæði mótvegis sær sjálvari, mótvegis fólkinum og mótvegis landinum.

– Hetta ger seg í serstakligan mun galdandi, tá ein hevur við livandi djór at gera.

Teir siga, at tá ið ILA fiskur verður tikin, skal ansast eftir, at fiskur við kliniskum sjúkueyðkennum ikki verður nýttur.

– Harvið er eisini sagt, at ILA fiskur kann takast, bera ansað verður eftir ávísum viðurskiftum.

Teir siga, at teir hava ansað eftir hesum viðurskiftum og hava skilt tann fisk frá, sum teir hava mett hava sjúkraeyðkenni.

– Hetta hevur verið gjørt við at skilt fiskin umborð á bátinum sum tekur fiskin upp, og á kryvjilinjuni, har fiskurin verður kruvdur.

– Henda skiljing hevur viðført, at vit hava burturbeint sløk 500 tons av laksi eftir forskriftunum fyri hávanda lívrunnið burturkast.

Teir siga, at fyri at minka um mongdina av fiski sum fer fyri skeyti av sjúkraáðum, hevur verið roynt at taka fisk áðrenn hann gerst sjúkur og doyr. Hetta má handfarast við skili so at ikki vandi er fyri at sjúkur fiskur kemur uppí tann fríska fiskin.

– Fiskin, sum vit hava tikið á henda hátt, hava vit selt til ein kunda í Eysturevropa. Yvirlit yvir allar hesar sølurnar eru send Heilsufrøðisligu Starvsstovuni.

Teir leggja afturat, at eingin slíkur fiskur seldur til ES.

– Vit hava ikki mett, at hetta varð brot á reglurnar um niðurberjing av ILA.

Men tá ið ivi nú er sáddur um hetta, hava teir tó tikið avleiðingarnar og eru steðgaðir við hesi mannagongd.

Teir siga ,at eini 90 tons av hesi vøru eru seld til kundan í Eysturevropa og at eini 43 tons liggja á goymslu, men tey verða burturbeind eftir boðum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni.

– Kundin í Eysturevropa sum annars keypir nógva aðra vøru frá okkum, hevur verið væl nøgdur við alla vøruna, og vildið helst keypt meira.

– Vit hava tó verið noyddir at greiða honum frá, at hetta ikki letur seg gera, tá myndugleikarnir í Føroyum meta at vit eru gingnir ov nær reglunum um niðurberjing av ILA.

– Sostatt verður vøran sum er á goymslu burturbeind, og eingin slík vøra virkað framyvir.

Teir vísa annars á, at at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur melda teir til løgregluna og at málið sostatt nú liggur í hondunum á løgregluni og at tað verður hon, sum fer at gera av, um ákæra skal reistast ímóti teimum.

